# BØNARLØTAN

**APRÍL** **2025** **40. árg.**

## *1. Týsdagur* — *Mark. 14.39-72*




**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 2**

Í løtuni koma nógv fólk til møtini í Kristnastovu. Biðið fyri teimum, ið luttaka á møtunum og bera orðið fram. Niels Pauli Nónstein vitjar okkum 4.-6. apríl.

**Susan og Øssur Berghamar**

Samkoman í Kristnastovu broytist rættiliga skjótt, tí nýggj fólk koma á hvørjum ári, og onnur fara – eitt nú tey, sum eru liðug við útbúgvingina. Tí tørvar okkum nógvan vísdóm at leiða og vegleiða. Biðið, at vit eru teimum til góða hjálp og stuðul, ið søkja samfelag við okkum. berghamar@kristnastova.dk

## KRINGVARPIÐ

6. apr., útvarpsmøti, Betesda, Klaksvík
27. apr., sjónvarpsmøti

## EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)

Sunnukv......kl. 21 Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskv..........kl. 21 Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Mikudagur* — *Mark. 15.1-47*

### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
### Inga McKendry



Vit hava skrivað Kolossebrævið og fyrra og seinna Tessalonikubræv. Nú skulu vit eftirkanna, um øll orð eru stavað rætt. Biðið fyri okkum.

## *3. Hósdagur* — *Mark. 16.1-20*

### USA, Nebraska, Ethnos 360
### Rachel og Peter Hansen

4.-28. apr. verða vit í Føroyum og 28. apr.-16. mai í Týsklandi til leiðarafundir. Biðið, at tíðin heima verður til signing, og um vísdóm til leiðarafundirnar.

### ZAREPTA



Samkomulegur. Várlega fyri fólk við breki verður dýra biðidag 16.-18. mai. Sámal Mikkelsen hevur nú leiðsluna av legunum í Zarepta.

## *4. Fríggjadagur* *4. Mós. 26.1-22*



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Terji 12, Petra 11**
Fyrsta vikuskifti í apr. hava vit vikuskiftismøtir í Kristianssand. Páskamøtir verða í Hvalba og aðrastaðni. Sangmøtir verða í Lívdini 16.-18. mai, tjaldmøtir í Sarons Dal í Noregi 20.-31. mai og tjaldmøtir í Norðurjútlandi 26.-29. juni. Eru í gongd við tónleikaframleiðslu í Noregi/ Svøríki. Vil onkur stuðla hesum, er konto 6460-6539906.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

## *5. Leygardagur* *Jóh. 9.1-23*



**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygard. 5. apr. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Biðið, at Harrin signar møtið.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Biðið, at Gud signar legurnar, og at børn og ung koma. Okkum tørvar at fáa trúgvandi starvsfólk, sum elska Jesus og Orð Hansara. Biðið fyri fíggjarligu støðuni.

## *6. Sunnudagur* *4. Mós. 26.23-43*




**MEKSIKO, Michoacán,**
**Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15,**
**Markus 13, Evita 10, Joy 8**
Biðið fyri Guicho og Chuy, sum standa einsamallir við ábyrgdini í samkomuni, meðan vit eru burtur.

## *7. Mánadagur* *Jóh. 9.24-41*



**ONGLAND,**
**European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
ECMI-stevnan verður 9.-16. apr. í Suðurspania. Vit fara hagar nakrar dagar undan at gera klárt og at hava leiðslufundir. Umleið 525 luttakarar verða til stevnuna, Simon verður ein av talarunum. Biðið, at Harrin varðar tey ferðandi, og at vikan verður til signing.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

## *8. Týsdagur* *4. Mós. 26.44-65*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Biðið fyri tænastu okkara á netinum, møtum, samtalum, STEVN og um vísdóm, og hvussu verk okkara í Pakistan skal gerast í ár.

**OM, SUÐURAFRIKA,**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**




Skurðviðgerðin hjá Tanju fyri gallstein gekk væl. Vit hava kent, at friður Guds, sum stígur upp um alt vit, hevur varðveitt hjørtu og hugsanir okkara í Kristi Jesusi *(Fil.4:7)*. Kæran viðvíkjandi visum varð latin inn í feb. Tað tekur vanliga 6 mán. at fáa svar, og vit ætla til Føroya um 3 mán. Vit hava tó longu fingið tíð hjá myndugleikunum. Gud er mentur. Takk, at tit standa saman við okkum í bøn.

*Í dag fyllir Ryan Jensen 16 ár

## *9. Mikudagur* *Jóh. 10.1-21*

**Atlantic Mission**

Vit fyrireika evangeliseringsferðina til Hirtshals 11.-21. juli í samstarvi við samkomuna Malta. Nógv ymisk tiltøk verða á skránni, bæði inni og úti fyri børn, ung og vaksin. Høvi verður at luttaka í verkinum. Biðið, at eisini ung tekna seg til ferðina.

## *10. Hósdagur* *Sálm. 41*

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**

19 fólk úr Føroyum luttóku á stevnuni Reach í Onglandi. Remi R. Rasmussen, Teitur Isaksen og Silas Jacobsen eru á bíbliuskúla, og Malvinus í Gong er á trúboðaraskeiðnum hjá North Cotes College. Minnist teir.

## *11. Fríggjadagur* *4. Mós. 27.1-23*




**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

Alsamt fleiri barnafamiljur leita til okkara. Barna- og ungdómsarbeiðið veksur. Herfyri vóru meir enn 40 børn í sunnudagsskúlanum. Biðið um, at tey møta Jesusi, og at trúgvin føðist í teimum.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Leygardagur* *Jóh. 10.22-42*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Luftgóðskan í Chiang Mai er vánalig hesa tíðina frá mars og versnar helst komandi mánaðirnar. Av royndum vita vit, at hetta er sera skaðiligt fyri heilsu okkara. Biðið um vernd og áhaldni í tíðini, ið liggur fyri framman.

## *13. Sunnudagur* *4. Mós. 28.1-15*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Vit eru Harranum takksom, at ongantíð fyrr hava fólk teknað seg at hjálpa so tíðliga á árinum. Um Gud vil, fer Páll yvir eftir páskir. 1. mai koma Anja Nielsen, Ólavur Neshamar og Hanus Christiansen

at mála húsini í Qaqortoq innan og gera Juvel siglingarkláran. Okkum tørvar arbeiðsfólk at gera legurnar klárar í juni.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Mánadagur* — *Jóh. 11.1-16*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Sunnudagsskúlalærararnir og børnini hava serligt vikuskifti annanhvønn mánað. Tey eta og hugna sær og hava gjølliga undirvísing í einum evni, eitt nú um *herklæði Guds*. Næstu ferð verður filmurin *Pílagrímsferðin* sýndur. Eisini hava tey lovsangskvøld, har børnini hava flestu uppgávurnar. Biðið fyri lærarum, børnum og familjum teirra.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Vit eru Harranum takksom fyri fleiri opnar dyr í Uganda at prædika og sýna filmin The Passion of Christ ymsastaðni, eisini í fongslum og møguliga eini flóttafólkalegu.

## *15. Týsdagur* — *4. Mós. 28.16-31*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**
Vit gleða okkum at fara til árligu páskaleguna 16. apr. Málið við leguni er Felagsskapur um Guds orð. Legan er fyri allar aldursbólkar. Biðið, at Harrin signar legu og luttakarar.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Mikudagur* *Jóh. 11.17-44*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit fyrireika møtini um páskirnar. Nógvir luttakarar eru, sangkór, tónleikabólkar og nógv onnur. Vit vilja, at tey, sum koma til møtini, hoyra evangeliið og verða signað.



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

## *17. Skírishósdagur* *Sálm. 42 og 43*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Vónandi verða samkomuhúsini liðugt útbygd til møtið 1. páskadag. Biðið fyri tilgongdini og arbeiðsfólkunum. Ein familja skal vitja okkum, nú Guðrun hevur frí tvær vikur á páskum.

## *18. Langi fríggjadagur* *4. Mós. 29.1-19*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 8**

La Fonte samkoman er í einari tilgongd at keypa ein bygning til alt okkara virksemi í Campobasso – um 50.000 fólk búgva her.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

## *19. Leygardagur* *Jóh. 11.45-57*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
**(fjararb.)**

Herfyri høvdu Ümit (Vón) outreach og uppfylging í fleiri býum sunnan- og eystanvert í landinum, mest fyri ung trúgvandi. Seinni hava tey eisini seminar um trúarverju fyri meir enn 100 luttakarum. Alsamt fleiri trúboðarar verða útihýstir úr Turkalandi. Mong fara tí, áðrenn tey hava brúkt kvotuna, fyri at varðveita møguleikan at vitja aftur. Tá kvotan er brúkt, er ikki loyvt at vitja aftur. Vit arbeiða við lesandi her í Oxford og við møguleikanum at tala í aðrari samkomu. Vit gleða okkum at koma heim um hálvan mai í nakrar vikur.

## *20. Páskadagur* *4. Mós. 29.20-39*



**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**
Tað gongur væl við okkara arbeiði á visumskrivstovuni hjá NTM her á Papua. Biðið, at Gud vísir okkum, hvørja tænastu hann hevur til okkara.

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 1, Salome 1**

## *21. Annar páskadagur* *Jóh. 12.1-19*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**
Vit fyrireika at stovna nýggja samkomu og at útvega bygning. Dópsfyrireikingar ganga væl, og í mars vórðu fýra doypt til Jesus. Biðið fyri samkomuni, at børnini vaksa í kærleika Guds, og at hjørtu teirra leitandi verða drigin til Jesus.

## *22. Týsdagur* *4. Mós. 30.1-17*

**EBENEZERKÓRIÐ**
Kórið vitjar í Skotlandi 24.-28. apr., fyrst í Edinburgh og síðan í Aberdeen. Tey syngja bæði uttandura og í samkomum.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Biðið, at fleiri føroyingar koma at hoyra gleðiboðskapin á móðurmálinum.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**
Biðið um vísdóm at raðfesta arbeiðið á skrivstovuni, meðan vit eru undirmannað.



**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *23. Mikudagur* *Jóh. 12.20-36*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Í dag kemur umsetingarráðgevin at eftirkanna Dóm. og seinnu helvt av 2. Sám. Biðið, at málhjálparin, ið vit nýttu seinast, verður tøkur. Hann fór til Dakar at arbeiða síðst í feb. og verður helst skjótur aftur. Wendy og Erik eru komin aftur úr farloyvi, og bíbliutímarnir byrja skjótt aftur. Biðið, at boðskapurin stendur teimum vitjandi greiður, og at tey velja rætta lutin. Nógv blanda alt saman: evangeliið, andatrúgv og lokalu trúnna.

## *24. Hósdagur* *Sálm. 44*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**



Vit hava saman við trúgvu samverkamonnunum her endurskoðað ymiskt tilfar, serliga evangeliseringstilfarið, sum vit brúka nógv. Tað skal prentast, áðrenn vit vitja samkomurnar og læra út frá tilfarinum og eggja teimum trúgvandi at vera trúføst við boðskapinum. Tað gleðir okkum, at fleiri eru sera trúføst at fara út til tey, sum ikki hava tikið ímóti evangeliinum enn.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**

## *25. Flaggdagur* *4. Mós. 31.1-24*

**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**



Síðst í apr. eru vit í Mindanao á Filipsoyggjum. Eg skal hjálpa nýggjum trúboðarum at kanna eftir, um fólkinum, sum býr í økinum, har trúboðararnir fara at virka, tørvar nýggja umseting, ella um tey kunna nýta umsetingina, sum fólk nærhendis nýta.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

*Í dag fyllir Markus Tuohy 13 ár

## *26. Leygardagur* *Jóh. 12.37-50*




**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**
Herfyri var eitt par, vit kenna væl, fyri ferðsluvanlukku. Ein maður á motorsúkklu koyrdi út fyri tey og doyði. Eftir vanlukkuna fóru Hans Arni og ein annar maður at hjálpa parinum. Tað gekk væl, og maðurin, ið koyrdi bilin, varð frídømdur. Biðið fyri teimum, sum mistu, og fyri parinum. Marion er í nevndini á Dakar Academy, har Ryan gongur í skúla. Seinastu fundirnir hava gingið væl. Á skúlanum ganga børn úr meir enn 30 londum. Minnist leiðsluna á skúlanum, sum hjálpir børnunum úr ymisku londunum.

## *27. Sunnudagur* *4. Mós. 31.25-54*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Vit eru sera takksom fyri, at Jesus-filmurin fyri deyv verður vístur í Keypmannahavn. Jens Pauli í Dali flytur til Føroya síðst í apr. og skal burturav arbeiða við TeknBíbliuni. Minnist hann á ein serligan hátt hesa tíðina, at alt skal gangast væl, og at hann fellur væl til aftur í Føroyum.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Mánadagur* *Jóh. 13.1-20*

**OM, LOGOS HOPE,**
**DOULOS HOPE, TeenStreet**

Ársfundurin hjá OM Føroyum verður í dag kl. 19.30. Ewout van Oosten frá TeenStreet International og I'Ching Thomas, limur í altjóða nevndini hjá OM, luttaka. Um mánaðarskiftið er árliga innsavningin til TeenStreet International. Síðst í mánaðinum fer Eva Elttør í 40 dagar á *Off the Grid* toymið hjá OM í Nýsælandi. Ólavur Groth fór umborð á Logos Hope sum stýrimaður í mars og verður við í nakrar mánaðir. Elsa í Skorini verður umborð í tríggjar mánaðir afturat. Óli og Frida Gregersen eru á Reach, missiónsskúlanum hjá OM í Suðurafrika. Tilmeldingin til TeenStreet er opin á www.teenstreet.fo. Eisini ber til at melda seg til TiM-túrin til Moldova á www.om.fo.

## *29. Týsdagur* *4. Mós. 32.1-22*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**

Claire er takksom fyri, at undirvísingarskeiðið í mars gekk væl. Biðið fyri teimum 24 luttakarunum, ið eru farnir út á markina. Næsta skeiðið byrjar 29. apr. í Birmingham. Biðið, at Harrin signar.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 5**

OM sendir møguliga nýggj samverkafólk at samstarva við okkum í samkomuni. Vit biðja, at Gud leiðir og sendir tey, hann hevur kallað. Okkum tørvar Guds vísdóm.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

# BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705



©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## 30. Mikudagur — Jóh. 13.21-38

### John Lennox, professari í Oxford og trúarverji

Á Veritas-ráðstevnu í Noregi talar John Lennox um *Íblástur frá Dániel í eini tíð við relativismu*. Hann vísir á sterku trúgv Dániels sum fyrimynd hjá ungum í dag at standa stinn í eini tíð, sum er merkt av relativismu. Við vísdómi og dirvi eggjar Lennox okkum at halda beina kós millum nútíðar avbjóðingar og samstundis at vera trúgv móti Guds sannleika. *(Talan er á enskum)*

1. partur: www.youtube.com/watch?v=TNlC3TWCltU (49 min.)
2. partur: www.youtube.com/watch?v=tPeHJIzy-dg (47 min.)
3. partur: www.youtube.com/watch?v=xafxXCTmeLc&t=325s (47 min.)

